## HEILSANIR



**Elskaða Bjarta**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum sunnudagin.
**Ynskja omma, abbi og Birita**



**Góða elskaða Ronja**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum. Nú ert tú stóra gentan hjá okkum.





**Allarbesti abbi**
Hjartaliga tillukku við degnum 13. sept. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Ynskja abbabørnini í Føroyum**



**Góða Marna**
Hjartaliga tillukku við 11 ára føðingardegnum.
**Ynskja mamma, babba, Jógvan og Oddvør**



**Góða Diana**
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum.
**Ynskja mamma, Kenneth og Barbara**



**Allarbesta Beinta**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum.
**Ynskja omma, abbi, gubbi og Einar**



Hvør skuldi trúð, at hendan lekra steikin rundaði tey hálvthundrað 12. sept. Vit gleða okkum til ballið og ynskja tær hjartaliga tillukku.
**Heilsan versynirnir**



**Hey Dia-ba**
Ogur ynskja tær hjartaliga tillukku á 20 ára degnum 10. sept. Vónandi verður veiðan betur næstu ferð.
**Frá ogun her suðuri**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum 12. sept. Vit ynskja tær alt tað besta í framtíðini. Vit gleða okkum til skíferiuna í vetur.
**Heilsan børnini**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum 12. sept. Eisini ein heilsa til Sørin abba á Toftum við 76 ára degnum 12. sept.
**Heilsan Sonni**

**Góði elskaði Jón**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 14. sept. Alt gott í framtíðini.
**Ynskja mamma, babba og Joan**
**PS.** Eisini ein heilsan til Bjørk, sum fyllir 6 ár 18. sept. Tit eru so fitt





**Góði beiggi**
Hjartaliga tillukku við 12 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja mamma, babba og Páll**



**Góða Siri**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 13. sept. Alt tað besta verður ynskt tykkum báðum.
**Heilsan myndaeigarin**


# Haldið Sosialin!

400,- kr.
um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr.
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

Ókeypis
Verður sent ófrankerað
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn




## TILTØK

**Sunnudagin**
**13. sunnud. e. trinitatis**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Hattarvík:* kl. 12 altarg.,
*Kirkja:* kl. 17, Elsa Funding
*Mykines:* kl. 10.45 altarg., David Johannesen
*Glyvrar:* kl. 11, Hans J. Joensen, biskupur, og Hjørdis Kjærgaard
*Sandur:* kl. 12, Martin R. Jacobsen (Tjørnuvíkingar syngja Kingo)
*Skálavík:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Fámjin:* kl. 12, deyvagudstænasta, altarg., Jónsvein Bech
*Klaksvík:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Fríggjadagin kl. 18 Tamburinvenjing.
Leygardagin kl. 10-14 hava skótarnir loppumarknað til inntøku fyri »Skótahjálpina«.
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 smáskótamøti og stórir skótar kl. 19.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20 verður JC Teens – fyri ungfólk til og við 18 ár.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli, Fríðtór Debes talar um endatíðina. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mikudagin kl. 17.30 AWANA. Kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti. Luttakarar frá NTM tala.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis er barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og samstundis er møti har Olaf Olsen talar.
www.hebron.fo

**Mariasystir Josuana úr Noregi**
hevur um Gud vil hesi møti: leygardagin 13.9. kl. 20 í KFUK í Havn: Møti, ung syngja.
Sunnudagin 14.9. **Vestmanna missiónshús** kl. 19.

**Aglow, Tórshavn**
Temadagur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygardagin 20. sept. kl. 10 til 15.30. Evni: Hin særda familjan. Alkoholtrupulleikar, manglandi sjálvsvirði hjá kvinnuni/barninum. Hvussu koma vit víðari? Kostnaður 120,- kr., døgurði á Sjómansheiminum íroknaður. Tilmelding á tlf. 313413 í seinasta lagi mikudagin 17. sept. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Bjarni Jøkladal um evnið: "Hvat er bøn og hví skal eg biðja?" og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um evnið: - "Endamál samkomunnar - Læran". Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldri á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Drekkamunnur er millum bæði møtini.
Úti á Fløtum: Mánakvøldið kl. 20: Alfa - Beta skeiðið og týskvøldið kl. 20 verður undirvíst í Opinberingini við Jógvan Z.
Heimasíðan:www.livdin.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Jóna Johannesen, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið bønarmøti kl. 20.30.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn, í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Ólavur Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti v/ Jacobinu Petersen, evni er: »loyst frá tunglyndi«.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardagin kl. 18.30: Messa í Mariukirkjuni.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa v/ biskupi Hans Martensen í Mariukirkjuni.
Aftaná verður kirkjukaffi.

**KFUM og KFUK í Havn**
Leygardagin kl. 19.30 í KFUK: Mariusystir Josuana hevur fund í KFUK: Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Meinhard Bjartalíð presti. Evni: Jeremia bók.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Leygardagin kl. 19.30–22.00: Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Ámundi Berthelsen.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við mariusystrini Joshuanu frá Evangel. Mariusysturfelagsskapinum í Darmstadt í Týsklandi.

**Saron, Vestmanna**
Telefonandaktin 424741.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Torstein Johannesen. Innsavnan til Heimamissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið Tabor á Toftum**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 Birgir Johannesen hevur um evnið: »Trúarvissa«. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnukvøldið kl. 18.00 verður møti, har Lone Hertz tosar um missión og um ferð sína í Cambodja. Innsavning til neyðstødd børn í Cambodja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 21. Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 13.30 bæði í Thabor og á Kambsdali. Møti verður kl. 18.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Símun Jacobsen. Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Bygdarhúsið í Tjørnuvík**
Felagsmøti verður leygarkvøldið kl. 20 við luttøku úr Skopun. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Karmel, Eiði**
Møtirøðin byrjar mikudagin 17. september kl. 20. Ámundur Bertelsen og Petur Magnusson tala. Menn av Strondum syngja. Bønarløta verður kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið: Opið hús kl. 21.00 v/ Símin Absalonsen. Sunnudagin: Møti kl. 17.00 v/ Martin Olsen. Barnamøti kl. 17.00.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Sang og vitnimøti. Barnaansing verður. Kl. 21 Ungdómsmøti v/ Sylverius Jacobsen.

**KFUM & K í Norðoyggjum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Elisabeth Vingborg, lmf. Innsavnan, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.kuff.fo

**Árliga LMF-stevnan**
verður í KFUM og K í Klaksvík 12. og 13. sept. Elisabeth Vingborg sigur frá 40 ár sum trúboðari í Nigeria. Fríggjakvødið 12. sept. kl. 20 fundur við Elisabeth Vingborg: Mit liv som missionær i Nigeria.
Leygardagin kl. 10 Bíbliufundur við Anne-Lene Olofson: Jødedommen på Jesu tid, kl. 14 Fundur við Elisabeth Vingborg: Den Lutherske kirke i Nigeria, kl. 16 Bíbliur til Kina: Ung í KFUM og K siga frá. Innsavnan til LMF. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Møti v/ Hjalgrím Davidsen. Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.

**Getsemane**
*á Brekku 19, Klaksvík*
Mikukvøldi kl.20.00 er bønarmøti
Fríggjakvøldi kl.20.00 er hugnaløta fyri ung
Sunnukvøldi kl.18.00 er møti (filmur um Thominu Svødstein verdur vístur).
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiðið 1.-5. fl.
Týskvøldið kl. 19 Tey ungu 6 fl. og eldri. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Møti verður sunnudagin kl. 18 har Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari talar. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Terja Nielsen og Jeannu Viderø. Mourits Viderø syngur. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Allir sjómanskvinnuringarnir í oynni samlast í missiónshúsinum í Hvalba leygardagin 27. sept. kl. 18.00. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.
**Hóskvøldið 18. sept. kl. 19** Barnagudstænasta í Hvalbiar kirkju v/ Bergi D. Joensen, kl. 20.30 Ungdómsmøti í missiónshúsinum. Drekkamuður.
Fríggjakvøldið 19. sept. kl. 20 Møti v/ Bergi D. Joensen. Ung luttaka. Drekkamuður.
Leygarkvøldið 20. sept. kl. 20 Møti v/ Bergi D. Joensen. Robert Thomsen syngur. Innsavnan til Heimamissiónina. Drekkamuður.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Ragnar Ludvig talar.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, Robert Mc-Luckie talar, kl. 21 Útifundur um viðrar.
Mánadagin kl. 20 Uppbyggingarfundur, Robert McLuckie talar.
Ónsdagin kl. 20 Bønarfundur.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøld Bønarmøti kl. 21 og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Kaffi er at fáa báðar dagarnar.
*Mánadagin 15. sept.*
Ulla Brandi kostráðgevi heldur fyrilestur um kost, serliga í mun til eldri fólk.
*Mikudagin 17. sept.*
Sólrun Christiansen lesur 2. part av framhaldssøguni »Sin egne lykkes smed«.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 30. september hava Maiken og Mikkjal Lervig, Leirvík, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 4.10.03 kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 443223 ella 222709 áðrenn 28. september.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 13.09. Runavík tlf. 44 70 10
Sunnudagin 14.09. Gøta tlf. 44 10 86

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Ikki er frelsa í nøkrum øðrum; tí at ikki er heldur nakað annað navn undir himlinum, givið millum manna, sum vit skulu verða frelstir við«*
*Áps. 4.12*

Í eini tíð, har nógvur átrúnaði bjóðar seg fram, og menniskju eru farin at ivast, um nú trúgvin á Kristus er hin einasti vegurin til Guðs, er avgjørt neyðugt at sláa hetta fast aftur og aftur, at til frelsu er ikki givið menniskjum annað navn enn Jesus.

Allir vegir føra til Rom, men bara ein førir til himmalin - Jesus.

Tað er so einfalt fyri teimum sum trúgva á hann, men tað er loynt fyri øllum øðrum, hin Óndi hevur fjalt hetta fyri eygum teirra. Tó er tað satt, at alt annað nyttar einki. Bjarging finnist ikki uttan gjøgnum hann. Tað var Jesus, sum kveikti ljós her á foldum, tá ið hann kom í heimin. Hann segði tað sjálvur: Eg eri ljós heimsins. Tann, sum fylgir mær, skal ikki ganga í myrkrinum, men hava lívsins ljós. Tað er Jesus, sum hevur fingið sambandið ílagi aftur millum himmal og jørð, tá ið hann á krossi bar revsingina, og vendi Guðs dómi burtur frá okkum, so at vit skuldu vera frí. Tað er Jesus, ið vunnið hevur deyðans veldið, tá ið hann páskamorgun reis upp frá teim deyðu og morlaði høvdið á tí gamla orminum. Tí er hann eisini hin einasti, sum kann loysa okkum úr fangaskapi.

Hetta er tað, sum skal vera rópt út um allan heim, hóast tað kann ljóða sum ein rødd í oyðimørk, hóast mong menniskju siga: Hatta hava vit hoyrt so ofta, og tí halda tað vera troyttandi. Tó skal tað verða rópt aftur og aftur: Jesus er okkara rættvísi, halgan og endurloysn, og frelsa er ikki í nøkrum øðrum. Amen!

**John S. Myllhamar**